## Trupulleikar aftaná skurðviðgerð

Vanliga  hvørvur eymleikin á arrinum aftaná nakrar vikur. Hart trýst móti handflatuni ella stór bendan í handliðinum kann tó geva pínu í fleiri mánaðir.

Vanliga minkar pínan í fingrunum rættiliga skjótt aftaná skurðviðgerðina. Kensluleysi hvørvur ikki altíð við somu ferð.

Um nervin hevur verið undir trýsti í langa tíð, kunnu ganga mánaðir, áðrenn kenslan kemur aftur í fingrarnar. Einstakir sjúklingar, serliga tilkomin fólk, fáa ongantíð kensluna rættiliga aftur.

Sum við øllum øðrum skurðviðgerðum er ein lítil vandi fyri bruna í sárinum, men álvarsligar komplikatiónir henda hjá minni enn 1 % av sjúklingunum.

Vinarliga
Skurðambulatoriið B3
(Harri Gudmundson/Beinta Nygaard)

Landssjúkrahúsið
tel 304500, www.ls.fo

Landssjúkrahúsið




# Karpaltunnil-syndrom

## Trýstið á stóru nervini við handliðin

Karpaltunnil-syndrom kemur av øktum trýsti á stóru nervina, ið fer framvið handliðinum. Nervin gongur gjøgnum ein smalan tunnil saman við boyggi-spongunum til fingrarnar og kann her vera fyri øktum trýsti.
Eyðkenni er pína og prikan út í hondliðin og út í ein ella fleiri fingrar uttan lítlafingurin. Eisini kann sovandi kensla merkjast. Ringast er ofta um náttina.
Hevur trupulleikin verið leingi kann vera, at kenslan í fingrunum er minni enn vanligt og manglandi megi, serliga í tummilinum.
Orsøkin er oftast ókend. Orsøkir, ið kunna nevnast, eru um tú ert við barn, aftaná hondliðsbrot, liðagigt ella tungt arbeiði.

## Viðgerð

Um eyðkennini eru komin í samband við tungt arbeiði, kann man í fyrsta umfari royna at spara hondina og evt. brúka handliðsskinnara.
Um støðan ikki batnar, kann tað vera spurningur um skurðviðgerð.

## Skurðviðgerð

Hondin skal vera rein og uttan sár.
Vanliga verður skurðviðgerðin gjørd ambulant í lokaldoyving.
Tað stramma liðbandið ið trýstir á nervina verður skorið gjøgnum ein S-formaðan skurð í húðina við handliðin.
Húðin seymast við 6-8 pentum.
Á sárið verður lagt plástur og umbinding.



## Aftan skurðviðgerð

Tað er umráðandi at tú heldur hondina uppeftir og boyggir og strekkir fingrarnar javnan. Hetta fyribyrgir, at hondin hovnar, og at tú fært pínu. Pína kann viðgerðast við handkeypsmedisin so sum 2 tablettir Panodil 3-4 ferðir um døgnið.

Umbindingin kann takast av aftaná 2 døgn. Lat plástrið vera á so leingi tað er turt, annars skal tað skiftast.

Tað má ikki koma vatn at sárinum, fyrr enn tað er turt. Hetta tekur uml. 3-4 dagar. Tað kann nú gott gerast vátt, men haldi ikki hondini undir vatn og nýt ein plastikposa um hondina, tá ið tú fert í bað.

Tá umbindingin er tikin, kann hondin brúkast sum vanligt, tó innanfyri pínumarkið.

## Sjúkramelding

Lættari arbeiði kann gerast aftaná 2-3 vikur, men um tú hevur tungt arbeiði kann sjúkramelding í 4-6 vikur blíva neyðug.

## Burturtaka av pentum

Tá 14 dagar eru gingnir skulu penturnar takast hjá kommunulækna.